# Norröna er sum ein tundurproppur í nógvum vindi

**Sjófrágreiðinging um óhappið hjá Norrønu vísti, at Norrönu ikki kundi standa ímóti nógva vindinum. Skiparin segði einki kunna gera. Var Norröna ikki farin innaftur, eftir at hon rendi á Molan, hevði hon sokkið ella rent á land. Frágreiðingarnar úr Maskinrúminum og av brúnni samsvara ikki heilt**

SJÓFRÁGREIÐING
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*



*Tá vindmegin fer upp um 19.3 metrar um sekundið so flýtur Norrøna sum ein tundurflaki . Hetta kemur javnan fyri í Havn, sigur havnarmeistarin*

Verður vindmegin meira enn 19,3 metrar um sekundið, so er einki at gera. Einki at gera við at royna at leggja Norrønu til lands. Tá flýtur Norrøna sum ein tundurkassi og er mestsum ikki at arbeiða við. Soleiðis gekk eisini hósdagin 15. januar.

Hetta kom fram í Sjófrágreiðingini um óhappið hjá Norrønu.

Rættarsalurin í J.C. Schrøters gøtu var stúgvandi fullur. So fullur, at hurðin mátti standa opin og fólk máttu standa í rættarsalinum. Áhugin var framúr stórur millum fólk, men tað vóru eisini nógv fólk, sum høvdu fingið boð um at møta. Topparnir hjá Smyril-Line vóru møttir upp, Tryggingin, umboð fyri Veðrættarhavarar og onnur gjørdi sítt til, at rættarsalurin stóð at bresta, tá Sjófrágreiðingin byrjaði nakað eftir kl. 13 mánadagin.

## Skipið hevði sokkið

Fyrstur at vitna í Sjófrágreiðingini var skiparin á Norrønu hósdagin, Ólavur Hovsgarð. Hann hevur undan vitnisfrágreiðing síni ikki sagt nakað alment um tilburðin hósdagin. Hann virkaði ógvuliga róligur og avkláraður við støðuna. Hann hevði ikki sín egna advokat við, og hann svaraði róliga og greitt øllum spurningum, sum vórðu settir honum.

– Eg kann ráða yvir veðrinum, mutlaði Ólavur Hovsgarð á veg inn í stólin í rættarsali trý fyri at siga søguna, sum flest allir føroyingar hava bíðað eftir.

Tað var Tórmóður Djurhuus, advokatur fyri Smyril Line, sum samn við dómaranum, Johannes Madsen, setti spurningar.

Ólavur Hovsgarð greiddi fyrst frá, at hann byrjaði hjá Smyril Line í 1983 og hevði verið fastur skipari umborð á Norrønu síðani 1998 og við til byggingina av hesari nýggju Norrønu.

Hósdagin vóru teir komnir aftur úr Íslandi. Tað hevði verið ódnarveður alla tíðina, men ikki meira enn skipið kundi klára. Við Rivtanga setti skiparin fulla ferð á fyri at halda tíðarætlanina. Norrøna kemur inn norðanífrá á Havnina. Àðrenn farið verður inn móti Eystaru bryggju at leggja at, fær Norrøna upplýst, at vindmegin er millum 10 og 17 metrar um sekundið frá Tórshavnar havn. Ættin er landnyrðingur. Skiparin ger av at royna at leggja at, tí skipið klárar at manirera við hesari vindmegini. Við grótkastið á veg inn í Havnina leggur Òlavur Hovsgarð til merkis, at vindmátarin vísir 17,6 m/s. Men tá gronin eru komnir inn um Molan veksur hann vindin. Vindmegin er meira enn tjúgu metrar um sekundið.

Tað kemur í vitnisfrágreiðingini hjá yvirstýrimanninum Paula Johannesen fram, at hetta var í sama viðfangi sum eitt æl.

- Eg prøvaði alt tað, eg kundi. Men tað vísti seg, at líkamikið hvat eg gjørdi, so fór skipið í drift og rakk móti Viðarnesi, har tað bar við land, segði Òlavur Hovsgarð.

Skipið tók í landssynningshorni á Viðarnesi. Ein stýrimaður bað ein skipsassistent kanna, um hol var komið á, og tað vísti seg at vera komið eitt stórt hol á. Illgruni er tá um, at ein skrúva hevur fingið skaða.

Ólavur Hovsgarð greiddi síðani frá, at hann royndi alt tað, hann kundi, fyri at fáa skip frá aftur. Hetta eydnaðist rímiliga væl. Skiparin roynir at fáa Norrøna út um Molan, men tá brúgvavongurin er á leið áraka endan á Molanum, ger ein stýrimaður vart við, at reyvin er bert fimm metrar frá landi og nærkast støðugt. Ólavur Hovsgarð greiðir frá, at hann roynir stýra bakborð-bakborð, men tað bar ikki til at fáa Norrøna av kósini móti landi, og síðani smekkaði skipi síðuna á land.

Hesin stoyturin var ógvuliga avgerandi. Hann inniber nevniliga, at hol kemur á skipið beint inn á Maskinrúmið og sjógvur fossar inn.

Òlavur Hovsgarð greiddi frá, at hann fekk hesi boðini frá maskinstjóranum, sum legði afturat, at leggjast mátti at landi skjótast gjørligt. Hesum tekur Ólavur Hovsgarð beinanvegin avleiðingarnir av og boðar Tórshavnar Havn frá, at hann ætlar at leggja at á Molanum. Hann biðjur um at fáa flutt eitt norskt skip, sum liggur mitt á Molanum og biðjur Tórshavnar Havn boðaði Sløkkiliðnum frá at koma á staðið við pumpum. Skiparin hevur staðið miðskips inntil víðari, men hann fer yvir í stýriborð fyri at taka kommandoina har, tá ið skipið eftir ætlan skal leggja at móti stýriborði. Skiparin varnast, tá hann er komin yvir í stýriborð á brúnni, at hann ikki fekk stýrt skipinum harfrá, tá tólini virka ikki. Hann fer síðani aftur til uppprunaligu støðuna miðskips, men heldur ikki har hevur hann nakran møguleika at stýra skipinum - onga maskinorku og lítlan og ongan møguleika at stýra skipinum.

Skipið kemur harðliga at landi á Viðarnesi. Skipið stendur ikki á botni - men er komið fast við land av tí at eitt hol á skipinum heldur tí fast at landi.

Ólavur segði, at hann boðaði MRCC, Smyril Line og Tórshavnar Havn frá støðuni. Hann bað um at fáa ein stigabil til ferðafólkið og catering-starvsfólk. Ikki minst tí so nógv konufólk vóru millum catering-starvsfólki, og tey kann mann illa arbeiða fyri í tílíkum støðum, helt Ólavur Hóvsgarð fyri í sjófrágreiðingini. Meðan hann ger hetta, boðar Ritan frá, at hon kann koma eftir ferðafólkunum og hinum, sum skuldu í land.

Tað er Brimil við hjálp frá Skúmaranum og Pressaranum hjá Skipasmiðjuni, sum hjálpa til at Norrønu leysa, og seinni verður hon løgd betri við Ískeiina. Vatn verður eisini pumpað yvir barlasttankarnar í stýriborð fyri at fáa at hella, soleiðis at skipið hellur fyri at vatnið ikki skal renna inn í skipið. Tá pumpurnar frá Tórshavnar sløkkiliði vóru komnar umborð, gekk skjótt við at fáa sjógvin úr skipinum.



*Ólavur Hóvsgarð var ógvuliga róligur og virkaði avkláraður við støðuna, tá hann segði sína søgu í Sjórættinum mánadagin*

Var Norrøna ikki farin innaftur, eftir at hon rendi á Molan, hevði hon sokkið ella rent á land, segði Ólavur Hóvsgarð eftirfylgjandi.

Eftir óhappið kundi Ólavur staðfesta stóran skaða á bakborðsskrúvuna umframt tvey hol á skipinum og annan skaða, sum ikki er heilt uppgjørdur enn.

Eisini aðrir menn, sum vóru staddir á brúnni, hósdagin vitnaðu í rættinum. Teirra vitnisburður váttaði stórst sæð alt, sum Òlavur Hóvsgarð greiddi frá.

## Megi kortini

Ólavur Hóvsgarð greiddi í sínari frágreiðing frá, at hann misti alla maskinorku, og kundi tí ikki fáa Norrønu at landi við Molan.

Poul Nolsøe Laksáfoss, maskinstjóri, greiddi frá, at teir ikki varnaðust at maskinmegin heilt var horvin. Men ábendingar vóru um, at tann eina skrúvan ikki virka við fullari megi.

Støðan í maskinrúminum var hættislig í so máta, at eini 150 tons av sjógvi vóru komin inn, og neyðugt var hjá elektrikaranum umborð at nýta alternativar metodur fyri at fáa streymin at virka aftur eftir stoytin við Molan.

Tískil eru nøkur ógreið viðurskifti viðvíkjandi, hvat sum júst hendi við maskinorkuni hjá Norrønu hósdagin.

## Kanna víðari

Tað varð mutlað nógv í krókunum, tá steðgur varð hildin í sjófrágreiðingini og áðrenn og aftaná. Men tað bar illa til at fáa nakra konkretar viðmerkingar. Hvørki um atburðurin hjá skiparanum hevði verið rættur ella hvat víðari fer at henda í málinum.

Skipaeftirlitið kannar í løtuni málið.



Havnarfútin í Havn:

# Púra vanligt



**Havnarfútin, Jónsvein Lamhauge, sigur, at veðurumstøðurnar hjá Norrønu hósdagin, tá hon bar við land tríggjar reisur, eru ikki óvanligar í Havn. Veðurfrøðingurin, Petur Skeel Jacobsen, sigur, at tað ber ikki til bert at tosa vindmegina, men at ættin eisini ávirkar atløguumstøðurnar**

NORRÖNA
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Stásiliga ferðamanna Norröna og ein skirvisligur tundurkassi. Er vindmegin meir enn 19,3 metrar um sekundið í Havn, flýtur Norröna sum ein tundurkassi og tá er snøgt sagt einki at gera. So avgjørdur var skiparin á Norrnu, Ólavur Hovsgarð, sum hevði ábyrgdina av Norrönu, tá hon hósdagin bar við Viðarnes og eystara mola, undir sjófrágreiðingini mánadagin.

Ólavur Hovsgarð hevur ikki dult fyri, at er nógvur vindur, er rættiliga torført at leggja Norrønu at í Havn.

Hetta varskógvaði hann longu í vár og seinasta hósdag fingu vit sjón fyri søgn. Spádómurin hjá Ólavi Hovsgarð gjørdist veruleiki og undir sjófrágreiðingini mánadagin staðfesti hann enn einaferð sína støðu um truplu atløguviðurskiftini í Havn, tá veðrið ikki er til vildar.

## Hendir javnan

Vit hava vent okkum til Havnarfútan í Havn, Jónsvein Lamhauge, og spyrja hann, um veðurumstøðurnar seinasta hósdag eru sjáldsamar. Havnarfútin svarar, at tað kemur meir enn so fyri, at vindmegin fer um teir 20 metrarnar um sekundið í Havn. Jónsvein Lamhauge leggur afturat, at serliga um vetrarnar er vindhart í Havn

– Vit hava eingi hagtøl, men tað er vanligt, at vindmegin kemur upp á 20 metur um sekundið í Havn. Eitt er, at vindurin kemur upp á ta megina, men ein annar spurningur er, hvussu leingi vindmegin heldur sær har uppi. Vit vita í Føroyum, at vindurin skiftir nógv, sigur Jónsvein Lamhauge.

## Ikki óvanligt

Undir sjófrágreiðingin kom eisini fram, at Havnarskrivstovan boðaði skiparanum, Ólavi Hovsgarð, frá, at vindmegin var í millum 10-17 metur um sekundi. Stutt undan, Norröna kemur inn á molan, kemur eitt eitt grovt æl við nógvum vindi og vindmegin økist brádliga til 20 metrar um sekundið.

Bæði skiparin, Ólavur Hovsgarð, og yvirstýrimaðurin, Pauli Johannesen, róðu undir sjófrágreiðingin framundir, at brádliga ælið var høvuðsorsøkin til, at Norröna bar við land á Viðarnesi fyrstu ferð

Havnarfútin, Jónsvein Lamhauge, sigur, at tað er ikki óvanligt, at boðini frá Havnarskrivstovuni ikki samsvara við vindmegina, tá skipini koma inn um molan.

– Skipini fáa boðini nakað uttanfyri fyri molan og tað er heilt nattúrligt, at ein broyting kann koma í, tá skipini koma inn um molan. Í førinum við Norrønu, kemur eitt æl og tá er púra vanligt, at vindmegin økist, sigur Jónsvein Lamhauge.

## Ættin avgerandi

Veðurfrøðingurin, Petur Skeel Jacobsen, sigur í stuttari viðmerking, at atløguumstøðurnar eru ikki einans tengdar at vindmegina, men sanniliga eisini ættini. Henda dagin, tá Norrönabar við land, var landnyrðingur og henda ætt er ring í Havn.

– Tað hevur víst seg, at landnyrðingur er ringur hjá skipunum í Havn, tí tá er nógvur vindur og torført at leggja at, sigur Petur Skeel Jacobsen.

Hann leggur afturat, at hevði talan verið um somu vindmegi og ættin var eitt nú útnyrðingur, hevði Norröna ikki havt stórvegis trupulleikar at leggja at.

## Eingi hagtøl

Fyri at vísa á, hvussu stórur ella lítil váðin er fyri, at Norrønu kann koma í somu trupulleikar sum seinasta hósdag, hava vit roynt at fáa fatur á neyðuga hagtalstilfarinum.

Føroyska veðurstøðin savnar veðurhagtølini saman, meðan DMI í Danmark umsitir føroysku hagtølini. Vit spurdu DMI um teir høvdu hagtølini fyri, hvussu ofta vindmegin 20 metur um sekundið og landnyrðingi(somu veðurumstøður, tá Norröna bar á land, blðm) kom fyri í Havn í 2003, men svarið var, at hagtølini fyri 2003 vóru ikki liðug viðgjørd enn.

Tískil ber ikki til at vísa nágreiniliga á, hvussu ofta hendingin hósdagin kann koma upp á tal, um Norröna framhaldandi bert hevur møguleika at leggja at í Havn.

# Einki minni enn eina katastrofa

**Óhappið seinasta hósdag kemur sum steinur oman á byrðu hjá Smyril Line. Fyri at endurvinna inntøkurnar, sum er mistar av vantandi flutningi av alilaksi, var Smyril Line júst farið undir nýggja farleið á Seyðisfjørð og Bergen. Óli Hammer heldur, at óhappið við Norrönu er einki minni enn ein katastrofa**

NORRÖNA
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Í viðtalu við Sjónvarp Føroya mánakvøldið duldi stjórin á Smyril Line, Óli Hammer, ikki fyri, at hendingin hósdagin var einki minni enn ein katastrofa fyri Smyril Line.

Stóra kreppan í alivinnuni og vantandi søla av gomlu Norrönu hevur havt við sær, at raksturin, ið frammanundan er tungur, er blivin væl tyngri enn metingar frammanundan. At Norröna komandi vikurnar ella møguliga mánaðirnar verður uttanfyri sigling kemur tí sum steinur á byrðu hjá Smyril Line.

Smyril Line var júst farið undir eina nýggja farleið fyri at endurvinna mistu inntøkurnar av vantandi flutningi av alilaksi, tá Norröna bar við land tríggir ferðir fyri góðari viku síðan og fekk umfatandi skaða.

## Óvist

Óli Hammer segði við SvF mánakvøldið, at Smyril Line var komið í eina ómetaliga óhepna støðu, tí teir vóru júst farnir undir nýggju farðleiðina millum Seyðisfjørð og Bergen.

Nógv verður tutlað í hornunum um, hvussu umfatandi skaðarnir eru á Norrönu, men leiðslan á Smyril Line er varin við at úttala seg um, hvussu leingi Norröna verður uttanfyri sigling.

Óli Hammer metti leystliga, at talan fór at verða um ein til tveir mánaðir. Hann greiddi eisini frá, at tryggingin tekur við skaðunum á Norrønu og tí fór sjálvt umvælingararbeiðið ikki kosta Smyril Line nakað.